VALGREINAR

# Lat løntakaran gjalda 30 oyru av hvørjari vunnari krónur

**Jónfinn Olsen**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



– og 50 oyru av hvørjari kr. sum er oman fyri kr. 300.000,00.

Hetta kundi verði ein háttur.

Eg havi í seinastuni hugsa nógv um henda møguleikan, men hugsaði síðan um, hvat vildi hent um hetta bleiv sett í verk. Tosaði síðan við ein búskaparfrøðing, leiðaran á hagstovuni um hesi viðurskifti, og meinti hann, at eg nokk hevði fatur á einum sera áhugaverdum tanka/møguleika. Fekk eisini at vita at fleiri serfrøðingar í øðrum londum høvdu arbeitt við nógvum ymiskum hugskotum viðv. Skattalættum o. ø.

**Framburð & arbeiðspláss.**
Ú. F. bar 28.05.2003 tey tíðindi frá skattaráðstevnuni, sum verið hevði, at har hevði onkur borið uppá mál, at ein avleiðing vildi verði framburður í samfelagnum og fleiri arbeiðspláss høvðu eisini komið, um slíkt uppskot bleiv sett inn í samfelagsstrukturin (her var nokk nevnt 20% og talan var ikki beinleiðis um Føroyar).

**Hvørjar aðrar fylgir.**
Man kann loyva sær at spyrja, hví verða ikki fleiri tílíkar hugsanir frammarbeiddar av og í Føroyum, sjálvsagt saman við hinum norðurlondunum, tí tílíkt kanningararbeiði vil sjálvandi kostað pening.

Roynt kundi verði at finna fram til, um okkara samfelag kundi brúkt eina slíka skipan, og hvørjar avleiðingar hon vildi fingið fyri land okkara, bæði av positivum og negativum avleiðingum. Tí sjálvsagt er ikki bara at seta nakað tílíkt í verk, men tílíkt eigur at verða kanna til fulnar við fyrimunum og vansum.

**Verkamannafjøldin og 30%, síðan 50%.**
Tankin kundi verði áhugaverdur at kanna, hvat vildi hent um verkamannafjøldin fekk ein rættiligan skættalætta, og ikki skuldi goldið meira enn uml. 30% av hvørjari vunnari krónu í skatti. Tá inntøkan síðan fór upp um eitt ávíst mark, kundi verði Kr. 250.000,00 ella Kr. 300.000,00, skuldi tað ið var omanfyri hesa upphædd verði skatta við 50% av hvørjari vunnari krónu.

Síðan kundi støða verði tikin til sjálvstøðug vinnirekandi, Sp/f., P/f. o.s.v. Eitt heilt annað skattamark, enn vit kenna tað í dag, kundi man sagt?

**Rokið á arbeiðsmarknaðinum.**
Samráðingar, slit, semingsmenn, lønarkrøv o.a. Ja hetta er nakað av tí, ið kann nevnast, og sum vit javnan renna okkum í.

Men hugsa vit okkum til, at nakað heilt munagott varð gjørt frá landsins leiðslu til frama fyri allar Føroyingar, allar partar á arbeiðsmarknaðinum o.s.v.

Kundu vit so sloppið undan stórum pørtum av øllum rumblinum ella hvussu?

**Hevði alt verið øðrvísi?**
Høvdu tað tá ikki verði krøv, men nøgdsemi og meira eftir í pengapunginum?

Høvdu vit í Føroyum kunna havt høgan og sunnan standard innan okkara heilsuverk, øllum Føroyingum at frama?

Osv.?????????

Vónandi er hetta ein grein sum fer at seta "debattin" (orðaskiftið) í gongd millum politikararnar og onnur í samfelagið okkara. Til frama fyri Føroyar og Føroyingar.

Miðflokkurin er ein flokkur sum vil gera sítt til, at fólkið hevur tað gott í Føroyum. So fólkið ikki bara verður undirdíkt við høgum avgjøldum og alt ov høgum skattatrýsti.

MIÐFLOKKURIN TÍN RØDD Á LØGTINGI.

# Tjóðskaparlig semja í sjálvstýrismálinum

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Fullveldispolitikkurin bar ikki á mál – tvørturímóti. Føroya fólk tekur als ikki undir við fullveldi her og nú, tí varð eingin fólkaatkvøða.

Javnaðarflokkurin ásannar hesa støðuna og mælir til eina breiða semju í hesum viðkvæma, men týdningarmikla málið.

Javnaðarflokkurin metir, at ein politikkur í sjálvstýrismálinum eigur at hava breiða uppbakking frá Føroya fólki og millum teir politisku flokkarnar her hjá okkum – eina undirtøku í fólkinum sum liggur oman fyri tey 75% bæði tá tað snýr seg um støðutakan til eina stjórnarlóg (føroyska grundlóg) og til eina sjálvstýrislóg (sjálvstýrissáttmála við Danmark).

Sokallaða Tvøroyrarskjalið er eingin verulig loysn, men bert forleingjan av verandi heimastýrislóg, sum nú er ótíðarhóskandi. Bæði sambandsflokkurin við sínum »nýskipanaruppskoti« og javnaðarflokkurin við »sjálvstýrisuppskotinum« eru meira tíðarhóskandi og konstruktiv og veruliga nýskapandi.

Ásannandi hesa politisku støðu mælir javnaðarflokkurin í sínum politikki til, at føroysku politisku flokkarnir gera eina tjóðskaparliga semju í sjálvstýrismálinum umfatandi helst allar flokkar í løgtinginum. Ein slík breið semja hevði gjørt okkum sterk mótvegis Danmark og vit sluppu undan hesum slítandi stríðnum við 50% fyri og sama ímóti, sum ger okkum veik í sjálvstýrismálinum.

Semjan skal umfata eina orðing um ein sjálvstýrissáttmála millum Føroyar og Danmark, har báðir partar viðurkenna hvønn annan sum tjóðir í einum felagsskapi. Sáttmálin staðfestir okkara sjálvsavgerðarrætt, ásetur valdsbýti og hann staðfestur eisini Føroya løgting og landsstýri sum hægsta myndugleika í øllum yvirtiknum málum. Eisini skal semja veraum, hvussu broytingar seinri skulu fara fram og sáttmálin skal hava altjóða rættarligt gildi.

Tann sokallaða grundlógarnevndin er eitt hóskiligt forum fyri samráðingum um hesa breiðu semju. Stjórnmálalógin, sum grundlógarnevndin arbeiðir við, sigur so víðari, hvussu politiska valdið er skipað í Føroyum og úteftir, hvussu landið er skipað fyrisitingarliga og rættarliga og rættindi og skyldur borgaranna vera lógarfest.

Latið okkum vísa, at tað ber til at standa saman um hesi álvarsmál.

# Føroyum tørvar eina sterka politiska leiðslu

**Thomas Juul Askham**
*Vælevni hjá Miðflokkinum í Suðurstreymi*



Um vit leggja oyra til hvat teir kønu siga í dag, her verður hugsa um teir leiðandi innan peningastovnar og búskaparfrøðingar, so er ein upptakt til gráar myrkar búskaparskýggjar fyri land okkara.

Tað verður tí sera umráðandi at vit fáa eina sterka politiska leiðslu, sum kann leiða land okkara ígjøgnum eina møguliga fíggjarliga niðurgongd.

**Mynduleiki, trivnaður og tryggleiki**
Fyri tann, sum hevur sítt arbeiði á sjónum, er tað umráðandi at ein hevur ein skipara, sum kann vísa mynduleika undir ábyrgd og sum kann vísa virðing fyri sínum fólki umborð.

Ein slíkur skipari vil somuleiðis føða tryggleika og trivna umborð hjá fólkinum. Fólkið kemur at halda av einum slíkum skipara og arbeiðsleiðara. Ein slíkur leiðari hevur ongar trupuleikar við at fáa fólk at verða saman við sær og at støðast umborð.

Í tí politiska høpinum hava vit so avgjørt fyri neyðini at fáa eina sterka politiska leiðslu, sum hevur mynduleika og sum kann skapa tryggleika og trivna í fólkinum og á arbeiðsmarknaðinum.

Tað verður ikki pláss í komandi tíðum, fyri gomlum politiskum aggi, ikki verður heldur pláss fyri at gera hvørjum øðrum politiskar ótanganeisir, til slíkt er tað politiska arbeiði ov álvarsamt.

**Teir stóru flokkarnir**
Ein skuldi trúð at teir stóru flokkarnir vóru garantar fyri trivna, tryggleika og ábyrgd.

Vit kunnu bert staðfesta og ásanna, at teir stóru flokkarnir hava graverandi trupuleikar, annaðhvørt innanhýsis ella tá tað kemur at finna eitt arbeiðslag, sum kann halda og geva trivna og tryggleika.

Tað verður tí neyðugt hjá veljarunum at melda klárt út, at slíka atferð og slíkt arbeiðslag ynskir ein ikki at síggja í komandi tíðum.

Tá ið valið varð útskriva, hoyrdu vit leiðararnar fyri teir stóru flokkarnar úttala seg um álit og trúðvirðið teir høvdu til hvønn annan.

Ein kundi ikki fáa aðra fatan enn hesa, at bæði trúðvirðið og álit kund ligið á einum sera lítlum stað, sum hesir høvdu til hvønn annan.

Um vit nú hugsa okkum at nakrir av teimum stóru skuldu mynda eina komandi poltiska leiðslu, so verða tað so mangir "kamelar", sum skulu slúkast, at long tíð kemur at ganga áðrenn vit fáa nakra politiska leiðslu upp at standa og tað kemur ikki at ganga long tíð til rembingarnar byrja at hoyrast og arbeiðsstevið byrjar at bila.

**Miðflokkurin**
Miðflokkurin vil framhaldandi ganga inn í tað politiska arbeiði undir ábyrgd til frama fyri land og fólk okkara.

Miðflokkurin vil arbeiða fyri at vinnulív okkara fær tær bestu umstøður at virka undir.

Miðflokkurin vil altíð verða opin og hoyriligur hvat vinnulívsfólk hava at førða framm, sum kann verða landi og fólki okkara til frama, hettar umfatar allar vinnur bæði á landi og sjógvi.

Miðflokkurin ásannar at skulu vit varðveita tann vælstand og tað tænastustøði vit hava í dag, má vinnan og tey vinnurekandi hava teir bestu karmarnar at arbeiða undir.

Miðflokkurin setur familjuna og familjumynstri sera høgt. Vit meta at eitt samfelag har trivnaður er í familjuni, er eitt sera sterkt og gott samfelag at liva og trívast í. Vit vilja arbeiða fyri at familjan hevur góð kor at arbeiða og liva undir.

Miðflokkurin vil framhaldandi arbeiða fyri at sjúkra- og heilsurøktin mennist og at hvørs lagna hjá teimum, sum komu at dregast við heilsutrupulleikar fáa tað bestu viðgerð, sum er nøktandi fyri viðkomandi.

Miðflokkurin vil arbeiða fyri at útjaðarøkini koma at verða betur hoyrd í komandi tíðum.

Miðflokkurin góðtekur ikki at danskir politikkarar leggja seg út í okkara løggávu og vilja diktera okkum hvat løggávusmíð vit skulu hava.

Miðflokkurin vil, at tað lógarsmíð, sum skal valda í Føroyum, skulu okkara egnu politikkarar standa fyri.

Miðflokkurin tosar við einari tungu um etiskar spurningar, sum hava sítt grundstøðið í tí kristnu trúnni og í Skriftini.

**20. januar 2004**
Vit vilja staðiliga heita á øll, sum vilja stuðla og velja Miðflokkin, um at standa saman við okkum og gera valdagin til dagin har Miðflokkurin far eitt gott val.

Vit heita á øll tykkum í øllum valdømunum: "Gerið brúk av tykkara demokratiska rætti og møguleika, at seta ein sterkan Miðflokk inn á løgting, sum kann gera seg galdandi í føroyskum politikki".

Til endans vil eg ynskja øllum, bæði á landi og sjógvi, eitt av Harranum vælsignað nýggjár.



VALGREINAR

# Ábyrgdarfullur fíggjar- og búskaparpolitikkur

**William Max Hansen**
*Valevni Javnaðarfloksins í Eysturoyar valdømi*



Ásannast má, at tørvur er framhaldandi at viðgera spurningin um, at seta mark millum tað almenna og tað privata.Spurningurin um privatisering er av sera stórum týdningi.

Áhugamálini, sum dentur má leggjast á eru:

BETRI røkt av ognum skattgjaldarans og inntjening landsins, harvið styrkja ella betra mótstøðuføri Landskassans til at basa búskaparligum kreppum, sum kunnu koma at hótta føroyska samfelagið.

Betra gagnnýtslu av búskaparligum tilfeingi og størri virðisøking.

**Tørvur á Politiskari viðgerð:**
Spurningurin um at áseta tíðarhóskandi mark millum alment og privat, harnæst møguligar broytingar av støðuni hjá tí almenna sum størsti fyritøkueigarin í landinum, hesi ting hava avgjørdan týdning fyri føroyingar. Eg meti, at tíðin er búgvin til, at spurningurin verður tikin upp til nágreiniliga viðgerð, og at støða verður tikin til, hvør kósin skal vera komandi árini.

Týdningarmiklasta drívmegin fyri privatisering má vera, at tað almenna minkar beinleiðis leiklut sín í framleiðsluvirkseminum, ynski um at draga útlendskar íløgur og vitan til landið og lóggeva hareftir, altjóðagerðing og tøknimenning.

**Almennur leiklutur:**
Tað almenna tók undan kreppuni í fyrru helvt av 90-árunum á seg stóran tapsvága í samband við fíggjar- og framleiðsluvirksemi. Landskassin bar somuleiðis stórt tap í samband við givin veðhald.

Kreppan hevði við sær, at almenni parturin í ávísan mun gjørdist leysur av tí vága, sum hevði niðurbundið hann undir kreppuni. Hetta byrjaði við, at veðhaldslógir vóru avtiknar.

Verður hugt nærri at, so hevði kreppan tó eisini við sær, at tað almenna varð munandi meiri drigið inn i vinnulívið. Hetta hendi við, at stóru

føroysku bankarnir - umframt týðandi partur av fyritøkuvirksemi viðvíkandi flaka og útflutningshandli - gjørdust almenn ogn.

Við hesum gjørdist ognarleikluturin í fyritøkum hjá tí almenna størri enn nakrantíð áður, spurningurin er so um ikki júst tann loysnin var tann rætta, eg hugsi hon var tann rætta, tað var í øllum førðum ein máti.

Støðan sum er, har tað almenna bæði fær inntøkur og hevur sínar ognir í føroyska búskapinum, er meira vági enn neyðugt,um t.d. útflutningskreppa tekur seg upp, minka skatta- og avgjaldsinntøkur munandi og sannlíkt er, at virðið á ognum hjá tí almenna í føroyska búskapinum minkar munandi.

Vit skulu víðari, nú má peningurin loysast aftur, tað almenna kann við at selja fyritøkur loysa pening, sum síðani kann setast í partabrøv og onnur virðisbrøv vi tíð fyri eyga, at spjaða vágan, og peningurin ber ávøkst.

# Eldrapolitikkur - ein spennandi avbjóðing

**Eyðgunn Samuelsen**
*valevni Javnaðarfloksins í Norðoyggjum*



Tíðum hoyra vit, at tey eldru eru ein bumba undir okkara samfelag. Hesa útsøgn kunnu vit í Javnaðarflokkinum als ikki taka undir við. Tey eldru hava lagt lunnar undir vælferðarsamfelagi og tí skal vælferðarsamfelagi vísa teimum virðing, við at skapa teimum eldru so góð kor sum gjørligt.

Tey, ið eru sjúk ella veik og hava hjálp fyri neyðini skulu fáa tað hjálp teimum tørvar. Hetta gerst best við at samskipa heimarøkt, sambýlir og røktarheim í eina heildarskipan, so tann einstaki bert hevur eitt stað at venda sær til og fáa tað hjálp júst honum tørvar. Hesa samskipan hava vit longi arbeitt við í Klaksvík.

Tey eldru ið ikki hava hjálp fyri neyðini, og tey eru tíbetur nógv, vera sjálvdan nevnd. Vit eiga ikki at gloyma hendan bólkin men spenna okkum út við avbjóðandi tiltøkum, sum eitt nú dagtilhaldi, har tey kunnu fáa nýggjar og spennandi avbjóðingar og felags upplivingar saman við øðrum í sama aldursbólki. Besta trygdin fyri einum góðum aldurdómi er at vera virkin.

Eisini mugu vit hava ein nýggjan arbeiðsmarknaðarpolitikk, so at tey eldru kunnu vera longri á arbeiðsmarknaðinum, um tey hava hug og orku til tað. Hetta skal gerast so, at tey kunnu arbeiða nakrar tímar ella dagar um vikuna, uttan at missa sína fólkapensión. Hinvegin skal tað eisini vera lættari at fara av arbeiðsmarknaðinum fyrr. Vit mugu hava eina eftirlønarskipan so, til dømis ein sjómaður, ið er slitin av hørðum arbeiði á sjónum, kann fara fyrr av arbeiðsmarknaðinum við eini sømuligari eftirløn.

Tey eldru skulu eisini hava møguleikan, í góðum árum, at velja at flyta í eina íbúð, sum á Kráarbrekku. Men fyri at hetta skal vera møguligt, hjá øllum eldri, mugu vit hava eina skipan, har íbúðarfeløg fáa somu rentustuðuls og mvg sømdir sum tey ið byggja privat hús, ikki fyrr er tað at flyta í eldraíbúð ein verðuligur valmøguleiki.

Ynskir tú ein aktivan og tryggan eldrapolitik velur tú Javnaðarflokkin.

# Rækjuflotin – eitt óynskt barn?

**Kristian Eli Zachariasen**
*valevni sjálvsstýrisfloksins í Norðoyggjum*



Ta seinastu tíðina hevur tann føroyski rækjuflotin verið rættliga frammalaga á breddanum hjá teimum føroysku fjølmiðlinum. Hetta, tíanverri má ein staðfesta, vegna heldur vánalig útlit fyri flotan.

Ikki hevur verið hoyrt til nakra ítøkiliga ætlan fyri at hjálpa hesum partinum av fjarfiskiflotanum og ger hetta framtíðina hjá hesu vinnu rættliga óvissa.

Um vit vilja varveita tey umleið 300 ársverkini og tey søguligu fiskirættindini ið eru knýttt at hesu vinnu, er alneyðugt at bráðfeingis hjálp verður veitt flotanum. Talan kann til dømis verða um, at innlima rækjuskipini í FAS í eitt styttri tíðarskeið, fyri síðani at taka heildarstøðuna hjá flotanum til viðgerðar aftur.

Eitt er vist, lata vit støðuna hjá rækjuflotanum fara fram við borðinum, koma vit at missa tey rættindi, ið teir føroysku rækjumenninir hava vunnið við íðni.

- Rækjuflotin er ikki óynsktur hjá Sjálvsstýrisflokkinum.

# Gloymdar útoyggjar

**Tummas Frank Joensen**
*valevni Javnaðarfloksins Sandoyar valsømi*



Ja so upplivdu vit á útoyggjum tað, at tað góða útoyggjaálitið, sum útoyggjanevndin legði úr hondum sínum, og var sett í samgonguskjalið.

Við føgrum lyftum, men lítið hava útoyggjafólk sæð av bata. Eitt av hjartamálum mínum er eitt framleiðsluhús á hvørjari oyggj, soeiðis at tað sum oyggin gevur av sær, kann vera framleitt og góðskað á hesum plássum klárt til brúkaran. Hettar høvdu verið kærkomin arbeiðspláss. Her rakk viljin hjá undanfarnu samgongu ikki til. Nú er vanlukkan nær um hend, og verður tað ringt at bjarga síðstu restum av smábygdunum í Føroyum, og helst noyðast tey síðstu húskini eisini at flyta, um ikki komandi samgonga ger nakað munagott.

Útoyggjarnar hava eisini ein annan møguleika, sum liggur ótroyttur, tað er alt grasið, sum stendur ósligið, her kundu útoyggjanar hjálpt væl til í landshúsarhaldinum, um tær kundu fingið loyvi til at selt stráfóður og harvið flutt minni inn. Hetta vil Javnaðarflokkurin virka fyri, um vit koma í samgongu eftir valið.

Farið á val og setið ein sterkan Javnaðarflokk á ting 20 januar.

# Kreppan í flakavinnuni = kreppuna hjá flakakvinnuni?

**Súsanna Dam**



Nú flakavinnan ikki kastar so nógv av sær, sum menn hava tørv á, skilst at meginorsøkin er hon, at flakakvinnurnar eru ov seinar, ineffektivar og pjakutar. Menn meta at tað er betri og meira lønsamt at lata kvikum og ódýrari kinesiskum kvinnum hetta arbeiði. Ein sera góð loysn tykist, tí so fær hin føroyska flakakvinnan meira tíð til at passa hitt fulltíðarstarv sítt. Hon fer at fáa stundir til at vaska, strúka og pussa. Eiga børn, syrgja fyri, uppdraga og verja. Ein annar fyrimunur verður, at tá hon aftur fer at passa mann, hús og heim, kunnu vit kanska sleppa undan, at føroyskir menn noyðast at leita sær útlendskar - russiskar, tailendskar ellar fillipinskar - kvinnur til at hita seg um náttina, tí eisini hetta fær fyrrverandi flakakvinnan aftur stundir til.

Er tað veruliga so lætt, fara tær kinesisku at gjalda fyri, at føroyskir menn framvegis kunnu sita á heitum skrivstovum á teimum ymsu fjallatoppunum og úthugsa sín avskeplaða samfelagsbygnað? Flokkarnir kalla tað vist familjuvinarligan politikk!!

Kvinna tú nyttar ikki longur, teir skifta teg út, við eitt bíligari og betri modell. Ætlar tú at lata tær hetta lynda, ella er ikki tíð uppá, at vit fara at hugsa um øll fólkini í hesum landinum, ikki bara menninar og teirra ómettiliga sjálvsókni? Men um so skal verða, mugu vit hava kvinnur, - fleiri kvinnur enn menn - til at smíðja landsins lógir.